UTTAN ÚR HEIMI

## Aftur vrakaður

Enn eina ferð hava demokratarnir í amerikanska Senatinum forðað fyri, at John Bolton verður tilnevndur amerikanskur sendiharri í ST.

Mánakvøldið atkvøddi Senatið fyri aðru ferð um at góðkenna Bolton sum ST-sendiharra. 54 senatorar atkvøddu fyri og 38 ímóti, men tað var ikki nóg mikið, tí góðkenningin skal hava minst 60 atkvøður.

Tað var í mai, at George W. Bush, forseti, bað Senatið góðkenna John Bolton sum sendiharra í ST, men teir demokratisku senatorarnir hava gjørt alt fyri at forða tilnevningini. Teir hava við vitnisfrágreiðingum avdúkað, at Bolton er yvirhøvur illa lýddur ímillum starvsfelagar, tí hann er alt ov snarsintur og harafturat einaráðandi av lyndi. Millum annað tí er hann ikki egnaður at umboða USA í ST, siga demokratarnir.

Bush heldur tvørturímóti, at hann er júst tann rætti maðurin til at fáa undirtøku fyri amerikonskum áhugamálum í heimsfelagsskapinum.

## Átak ímóti mafiuni

Spanska løgreglan hevur framt eitt stórt átak ímóti teirri russisku mafiuni, og higartil eru 28 fólk tikin ymsastaðni í Spania. Ímillum tey tiknu eru fleiri ríkisborgarar úr Russlandi, Ukraina, Moldova og Georgia, men nakrir spaniumenn vórðui eisini tiknir í sama viðfangi.

Sponsku myndugleikarnir siga, at nógvir limir í russisku mafiuni hava valt at búseta seg í Spania, har fleiri teirra hava fingið sær hús av tí dýrasta slagnum við Miðjarðarhavsstrondina. Pengarnar fyri húsini hava teir útvegað sær við eitt nú smugling og burturflytingum, og í sambandi við átakið hevur spanska løgreglan lagt hald á 800 bankakontur umdramt ein hóp av listarverkum, gimsteinum og øðrum virðislutum.

Umleið 400 løgreglumenn vóru við í átakinum, sum var í býunum Barcelona, Alicante, Marbella, Fuengirola og Torremolinos.

## Fleiri doyggja í ferðsluni

Kanningar hjá donsku løgregluni vísa, at danir koyra ikki skjótari, sjálvt um politikararnir hava sett hámarksferðina á summum teinum úr 110 upp í 130 kilometrar um tíman.

Kortini vísa tey seinastu hagtølini, at fimm teir fyrstu mánaðarnar í ár doyðu 15 fólk í ferðsluni á motorvegunum í Danmark, og tað er eitt meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Í Danmark sum heild doyðu 30 fólk í ferðsluni í mai ímóti 40 í meðal sama mánað tey seinastu fimm árini.

Stjórin í Rådet for Større Færdselssikkerhed, René la Cour Sell, sigur við Politiken, at út frá hesum má roknast við, at ferðslan á motorvegunum fer at krevja væl fleiri mannalív í ár enn í fjør.

## Dugnaligir leiðarar

BusinessWeek hevur gjørt eitt yvirlit yvir teir mest dugnaligu vinnulívsleiðararnar í Evropa.

Bara tveir norðurlendingar eru ímillum tíggju teir dugnaligastu. Annar er aðalstjórin í norska oljufelangum Statoil, Helge Lund, sum sambært BusinessWeek er tann næstdugnaligasti vinnuívsmaðurin í Evropa. Hin er stjórin í svensku bilaverksmiðjuni Volvo, Leif Johansson. Hann er nummar sjey á listanum. Ímillum teirra kappingarneytar eru stjórarnir í kendum fyritøkum so sum Goodyear, Continental og Wolseley.

BusinessWeek sigur, at felags fyri teir dugnaligastu stjórarnar er, at teir eru bjartskygdir og ótroyttiligir, og at teir hugsa øðrvísi enn tað gamla liðið av evropeiskum vinnulívsleiðarum.



*Afghanskir løgreglumenn uttan fyri eina mosku í Kabul, sum bleiv álopin herfyri*

*Mynd: Reuters*

# Taliban ger aftur vart við seg

**Hóast fýra ár eru liðin, síðani amerikanski herurin rak Taliban frá valdinum í Afghanistan, er rørslan framvegis virkin, og í seinastuni er hon farin at gera vart við seg**

AFGHANISTAN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri nøkrum døgum síðani skrivaði afghanska blaðið Erada, at 300 afghanskir stjórnarhermenn vóru rýmdir úr einari legu í Kandahar. Teir vildu ikki góðtaka umstøðurnar, sum herleiðslan bjóðar herinum, og harafturat vóru teir troyttir av teimum áhaldandi álopunum frá Talibandeildum.

Í síðsta mánað segði ein týðandi Taliban-leiðari við pakistanska sjónvarpið, at Osama bin Laden og mullah Omar skipa fyri mótstøðuni í Afghanistan, og at málið er at reka amerikanararnar og hinar fremmandu hermenninar av landinum. Næstan dagliga fræ ttist frá álopum, sum boða frá, at tann gamli fíggindin er ikki niðurbardur, men at hann tvørturímóti ger alt meiri og meiri um seg, skrivar Reuter.

Tey flestu álopini hava verið har eysturi í landinum nærhendis pakistanska markinum, og í seinastuni hava minst seks amerikanskir hermenn latið lív í Taliban-álopum har. Pakistonsku myndugleikarnir hava sagt seg vera til reiðar at forða Taliban at ferðast um markið, men sambært Reuter ferðast álopsmenninir at kalla ótarnaðir um markið.

### Rýma úr herinum

Í seinastuni er Taliban eisini farið at gera um seg í sjálvum høvuðsstaðnum Kabul. Tann 30. mai brast ein bumba uttan fyri NATO-høvuðsstøðina í býnum, og nakrar dagar seinni doyðu seks fólk av einari aðrari bumbuspreinging. Fleiri fólk eru eisini burturflutt.

Afghanski forsetin, Hamid Karzai, hevur sagt, at stjórnarherurin skal berja Taliban niður, men útlendsk tíðindafólk í landinum siga, at tað er so sum so við stríðshuginum hjá hermonnunum. Umstøðurnar hjá stjórnarhermonnunum kunnu als ikki samanberast við umstøðurnar hjá amerikonsku og hinum femmandu hermonnunum, og harafturat fáa hermenninar ikki løn ræ ttstundis. Tí rýma nógvir úr herinum, og tað gevur Taliban uppafturrúmari ræsur, siga útlendsku tíðindafólkini.

# Nýggj bók um Clinton-hjúnini

**Fyrrverandi blaðstjórin á Newsweek hevur skrivað bók um Hillary Clinton. Men bókin snýr seg eisini um mann hennara, og alt er ikki líka hugligur lesnaður**

BÓK

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í bókini, sum eitur "The Truth about Hillary" (Sannleikin um Hillary) skrivar Edward Klein ymsar søgur um fyrrverandi forsetafrúuna og mann hennara, men fyribils hava teir flestu amerikonsku fjølmiðlarnir gjørt lítið burtur úr innihaldinum.

Kortini hava onkur bløð valt at prenta partar av bókini, og tey hava sum vera man lagt seg eftir tí, sum Edward Klein skrivar um samlívið hjá fyrrverandi forsetahjúnunum. Ella kanska rættari sagt tað, sum hendir uttan fyri samlív teirra. Millum annað verður nógv gjørt burturúr, at Bill Clinton hevur sera gott samband við eina fráskilda kvinnu, og at ein bilur hjá Secret Service, sum verjir fyrrverandi forsetan, skal hava staðið uttan fyri húsini hjá kvinnuni minst einaferð.

Politiskir eygleiðarar í USA halda, at tann nýggja bókin hevur til endamáls at forða fyri, at Hillary Clinton verður afturvald til senator í New York í heyst, og at hon skal gerast tann fyrsta kvinnan í amerikanska forsetaembætinum. Meiningakanningar hava víst, at meiri enn 50 prosent av veljarunum ætla sær at velja hana, um hon stillar upp á forsetavalinum í 2008.

Teir politisku eygleiðararnir vísa eisini á, at forlagið, sum hevur givið bókina hjá Edward Klein út, hevur gott samband við tann erkakonservativa vongin í amerikonskum politikki.